# Minnislepi

## Funkur í journalini

Talgild heilsuskipan

| STIG | SKÍGGJAMYND |
| --- | --- |
| Í journal hjá borgaranum síggjast hesar ímyndir ovast høgru megin á skíggjanum.<br><br>Trýst á ta ovastu ímyndina fyri at opna/lata aftur yvirlitið yvir funkurnar. |  |
| **Leita eftir notatið í journal**<br><br>Uttast á høgru síðu sæst yvirlit yvir tey notat, ið eru skrásett uppá borgarin, sum er í patientlinjuni.<br><br>Vel ta notatið úr úrvalinum, sum tú vil lesa.<br><br>Tá ið tú hevur trýst á notatið við músini gerst notatið sjónligt á skíggjanum, eisini sæst ein gul ramma kring valda notatið. |  |

<table>
<tr>
<td>Filtur funka<br><br>Tað er fleiri møguleikar í at filtrera í journal og í standardplan hjá einum borgara.<br><br>Tað er m.a. møguligt at filtrera eftir rollu hjá starvsfólki, eind, behandlingsplan, sum er løgd ella einum ávísum tíðarskeiði.</td>
<td></td>
</tr>
<tr>
<td>Ger títt egna filtur<br><br>Tú kanst gera tær eitt persónligt filtur, um tú hevur eitthvørt, sum tú ofta hevur tørv á at leita fram.<br><br>Vel hvat tað skal filtrerast uppá og trýst síðani á Gem<br><br><br>Nú sæst ein kassi á skíggjanum.<br>Gev filtrinum eitt heiti og trýst á Gem</td>
<td>


</td>
</tr>
</table>

Fyri at finna títt persónliga filtur aftur

Trýst á pílin




**Broyta breidd av journal og stødd av teksti**

Hendan ímyndin kann stilla breiddina av journalini.

Hendan ímyndin kann stilla støddina á tekstinum.
Tað er møguligt at velja í millum normal, medium og stor.



**Leitifunka**

Leita í fríteksti í innlisnum notatum. Tað er møguligt at leita í tekstinum, sum er skrásettur í eini journal.



Aftast í leitifeltinum sæst, hvussu ofta orðið, tú leitar eftir er funnið í tekstinum.

Tær gulu linjurnar vísi hvar orðið kemur fyri í journalini.



| | |
|---|---|
| **Tíðarrað**<br><br>Við at trýsta á hesa ímyndina er møguligt at broyta tíðarraðið, tvs. tað er møguligt at tey elstu notatini leggja seg ovast. |  |